## Sunnudagur 28. apríl

### SVF

12.50 Formel 1 koyring í Spania
15.00 Markleysa ríkið 19:26 e
15.30 Rasmilla - 4 ár og gudinna í Nepal
16.00 Gudstænasta úr Fríðrikskirkjuni
17.10 Havsins ríkidømi - norsk dokumentar
18.00 Markleysa ríkið 20:26
18.30 Mowgli 15:52 e
19.00 Valfundur í Norðurlandahúsinum
22.10 The Scarlet Pimpernel 2:3 - ensk stuttrøð
23.40 Bókatátturin
0.10 Liðugt

### Eurosport

7.30 Adventure - Adnatura
8.30 Motocross - World Championship - Live
11.00 Motorcycling - Endurance Imola - Live
11.30 Weightlifting - European Championship - Live
13.30 Weightlifting - European Championship
14.00 Artistic Gymnastics - European Championship - Live
15.00 Weightlifting - European Championship - Live
16.45 News - Eurosportnews Flash
17.00 Cycling - World Cup
18.30 Motorcycling - Endurance Imola
19.00 Equestrianism - Show Jumping - Live
20.00 Nascar - Winston Cup Series
21.00 Indy Racing League
22.00 News - American News
22.15 News - Eurosportnews Report
22.30 Artistic Gymnastics - European Championship
23.45 Weightlifting - European Championship
0.15 News - Eurosportnews Report

### BBC Prime

0.30 TLZ: »The Art of Breathing«
1.00 TLZ: »Sounds – What have the 60s ever done for us?«
1.10 TLZ: »Science Bites – Invisible Worlds«
1.15 TLZ: »Forens – Lab Detectives«
1.30 TLZ: »Catching the Good Health Train«
2.00 TLZ: »Did Tibet Cool The Earth?«
2.25 TLZ: »Science Bites – Natural Symmetry«
2.30 TLZ: »Kedleston Hall«
2.55 TLZ: »Mind Bites«
3.00 TLZ: »Women and Alegory«
3.30 TLZ: »Volcanoes and The Atmosphere«
3.55 TLZ: »Mind Bites«
4.00 TLZ: »The Black Triangle«
4.25 TLZ: »Pause«
4.30 TLZ: »Picasso's Collages«
4.55 TLZ: »Under the Lens - Face«
5.00 TLZ: »Biosphere«
5.30 TLZ: »Food – Whose Choice Is It«
6.00 The Story Makers
6.15 Step Inside
6.25 Angelmouse
6.30 Joshua Jones: »Treasure«
6.40 Playdays
7.00 The Story Makers
7.15 Step Inside
7.25 Angelmouse
7.30 Joshua Jones: »Boomer«
7.40 Playdays
8.00 Blue Peter
8.25 Blue Peter
8.45 Top of the Pops Prime
9.15 Totp Eurochart
9.45 Wild and Dangerous: »Bear Country«
10.15 Vets in Practice: »Lovesick«
10.45 Ready Steady Cook
11.30 Bargain Hunt
12.00 House Invaders
12.30 Some Mothers do ave em: »Father's Clinic«
13.05 Eastenders Omnibus
13.35 Eastenders Omnibus
14.05 Eastenders Omnibus
14.35 Eastenders Omnibus
15.00 Little Lord Fauntleroy
16.00 Top of the Pops 2
16.45 The Weakest Link
17.30 Gardeners' World
18.00 Antiques Roadshow: »Shetland«
18.30 Holby City: »Kill or Cure«
19.30 Keeping up Appearances
20.00 My Hero: »Car«
20.30 Coupling: »Flushed«
21.00 Chambers: »It's Only Words«
21.30 Murder most Horrid: »A Life or Death Operation«
22.00 The Young Ones: »Sick«
22.35 In a Land of Plenty
23.30 Dr. Who: »Delta & The Bannermen«

### BBC World

0.00 BBC News – followed by Weather
0.30 This Week (r)
1.00 BBC News – followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News – followed by Weather
2.30 Africa Direct (r)
3.00 BBC News – followed by Weather
3.30 Correspondent (r)
4.00 BBC News – followed by Weather
4.30 This Week (r)
5.00 BBC News – followed by Weather
5.30 The Car's The Star (r)
6.00 BBC News – followed by Weather
6.30 Reporters
7.00 BBC News – followed by Weather
7.30 Clarkson's Car Years: »Who killed the British Car Industry?« 4:6 (r)
8.00 BBC News – followed by Weather
8.30 Earth Report: »Green Gongs« (r)
9.00 BBC News – followed by Weather
9.30 This Week (r)
10.00 BBC News – followed by Weather
10.10 Boxing: This Bloody Business (r)
11.00 BBC News – followed by Weather
11.30 Click Online (r)
12.00 BBC News – followed by Weather
12.30 Africa Direct (r)
13.00 BBC News – followed by Weather
13.10 Michael Palinís Hemingway Adventure (r) 04-Apr
14.00 BBC News – followed by Weather
14.30 Reporters (r)
15.00 BBC News – followed by Weather
15.05 Dateline London
16.00 BBC News – followed by Weather
16.10 The Future just happened: »Past vs. Future« (r)
17.00 BBC News – followed by Weather
17.30 Holiday (r)
18.00 BBC News – followed by Weather
18.10 Boxing: This Bloody Business (r)
19.00 BBC News – followed by Weather
19.30 Africa Direct (r)
20.00 BBC News – followed by Weather
20.10 Michael Palinís Hemingway Adventure (r)
21.00 BBC News – followed by Weather
21.10 The Car's The Star (r)
22.00 BBC News – followed by Weather
22.30 Dateline London (r)
23.00 BBC News – followed by Weather
23.30 Reporters
23.45 Asia Today

### TV 3

5.05 Børnehjørnet
7.45 Garfield og venner
8.15 Onside Kids
8.45 Politiskolen
9.40 Xena: Warrior Princess
10.30 Luftens helte
11.25 Fortællinger fra Serengeti
12.35 Alt under kontrol
13.35 Any Day Now
14.30 TV 3's magiske filmverden: På eventyr i det vilde Amerika
16.30 Fear Factor
17.30 Interne Affærer
18.30 Onside
20.00 Søndagsfilmen: Die Hard - Mega Hard
22.25 Skjulte Spor
23.30 Mit fædreland
1.30 Kodenavn Nikita
2.25 Sunset Beach
3.10 Sunset Beach
3.55 Godnat

### ÚF

10.00 Tíðindi
10.05 Sunnudagsløtan - Jonna og Kári leggja til rættis
10.30 Sálmar og sangir (e) - Fram i heiðanna ró - bóndakórið av Skagafirði. Finnur S. Olsen stílar fyri
11.00 Guðstænasta í Vesturkirkjuni - Bergur Debes Joensen, prestur, prædikar
12.10 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
13.10 Meðan løtur líða - Torv. Marianna Debes Dahl og Pauli Magnussen løgdu til rættis
13.40 Heimafjálgt við tignarlag - Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tíðindini
14.15 Relaks - Edward Nyholm Debes og Finnur Hansen skipa fyri
15.15 Kvøðuljómar
16.00 Fólk og frítíð (e) - Gunnar Nolsøe leggur til rættis
17.00 Tónar og greinir (e) - Birgar Johannesen leggur til rættis
18.00 Tónleikur
18.30 Tíðindi
18.40 Ítróttatíðindi
21.00 Liðugt
22.00 Politiskur valfundur í Norðurlandahúsinum - Fundurin verður sendur beinleiðis í útvarpi og sjónvarpi

## Formel 1 koyring í Spania




SVF beinleiðis.

Aftaná sigurin í Imola er tann eldri Schumacher heili 14 stig frammanfyri lítlabeiggjanum. Hetta kundi sæð út sum ein trygg leiðsla, men av tí at Barcelona ongantíð hevur verið ein góð breyt fyri Ferrari, minkar gloppið væntandi sunnudagin. Møguleiki er eisini fyri at McLaren fær sín fyrsta sigur í ár, tí teir eru sterkir í Barcelona. Hevði McLaren bilurin hjá Häkkinen ikki brent saman 300 metrar áðrenn málið í fjør, so hevði Häkkinen við McLaren vunnið GP í Barcelona hvørja ferð tey seinastu fýra árini. Men í ár er Häkkinen ikki við, og tað fer at gera tað lættari fyri Michael Schumacher.

## Endaspurtur í Norðurlandashúsinum

**SVF Sunnukvøldið kl. 19.00**

Sjónvarpið og útvarpið skipa sunnukvøldið 28. apríl fyri stórum valfundi í Norðurlandahúsinum. Hesin fundur byrjar klokkan 19.00 og verður sendur beinleiðis í útvarpi og sjónvarpi. Fundurin er almennur.

Fundurin verður ein pallborðsfundur, men umboð fyri flokkarnar fáa eisini møguleikan at koma við uppleggum um ávís politisk evni.

Vertir eru Jógvan Jespersen og Øssur Winthereig.

## Die hard – Mega hard

Bruce Willis, Jeremy Irons og Samuel L. Jackson kunnu upplivast í mót- og viðspæli í hesum triðja parti av mest kendu actiontriologiini nakrantíð. Tað hava verið upp- og niðurtúrar fyri løgreglumannin John McClane – men í seinastuni hevur tað mest gingið niður á bakka. Konan er rýmd við børnunum, og John hevur funnið fløskuna fram, og karrieran er, eins og hann sjálvur, á botninum. Tá ein bumba brestur í eini sølumiðstøð í New York, vendir tann gátuføri gerningsmaðurin, Simon seg til løgregluna, og krevur at McClane verður settur á málið. Nú byrjar eitt nervapirrandi spæl millum løgreglumannin og bumbuyvirgangsmannin, sum í gátum fortelur Joh, hvar fleiri bumbur eru goymdar. Eftir eina marruuppgerð í Harlem, har McClane varð tvungin av Simon at ganga runt við einum »Eg hati nekarar«-skilti, verður tann svarti,




Zeus Carver blandaður upp í. Skjótt finnur John McClane útav, at Simon hevur samband við gamla fíggindan, Hans Gruber, og seinni finna teir báðir út av, at Simon hevur nógv størri ætlanir enn eini tvær keðiligar bumbu-spreingingar í New York.

### Rás 2

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Gospeltónleikur
13.00 Kelduvaðið (EvR) - Páll og Maria Poulsen siga frá um kristniboðan - Osvald Kjærbo talar yvir brot úr søgu Ísraels - (8.14)
14.00 Føroyskir sangir og sálmar
15.00 Profilurin: Bjarti Mohr (e) - endursending frá mikudegnum - Tosa verður m.a. um vinnulív - Sonne Smith leggur til rættis
16.00 Barnarásin - Hesaferð við Oddbjørg og Lissi
16.30 Tónleikur
20.00 Kelduvaðið (EvR) (e) - Endursending frá kl. 13.00 í dag - Páll og Maria Poulsen siga frá um kristniboðan - Osvald Kjærbo talar yvir brot úr søgu Ísraels - (8.14)
21.00 Tónleikur
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
0.00 Endursending frá kl. 12.00 í dag non stop til kl. 06.00

### Lindin

9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
9.30 Barnalindin beinleiðis sending úr studio A, vertur er Lív Jacobsen
10.00 Lovsangur
12.00 Møti
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin Barnasending v/ Lív Jacobsen (e)
15.00 Sjómansendingin á ranguni »Við fuglfiringum á Zarepta« við M. C. Resteroff (e)
16.00 Teldan velur løg
17.55 Dagsins orð, eftir Svenning av Lofti
18.00 Tónleikur fyri tilkomin v/ Steindor Hjaltalin og Tórbjørn Láadal
20.00 Barnalindin Barnasending v/ Lív Jacobsen (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Møti (e)
22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Dagsskráin fyri mánadag verður lisin
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
2.00 Horizon Star (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast

Vikuskifti

Nr. 79 • fríggjadagur • 26. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## - Tað er stór ábyrgd at vera landsliðsvenjari

- sigur danski landsliðsvenjarin í fótbólti, Morten Olsen, sum Sosialurin hevur hitt



Lesið s. 6 og 7



*Mussi legði tann 14. mars nakrar persarakettlingar. Eigarar eru Mette og Kenneth Nygaard á Glyvrum*

*Mynd: Edvard Joensen*

# 2500 krónur fyri eina kettu

Mette og Kenneth Nygaard keyptu fyri nøkrum mánaðum síðani eina ektaða persarakettu. Fyri fimm vikum síðani legði hon seks fittar persarakettlingar

**KETTULÍV**

*Ingrid Bjarnastein*

– Vit keyptu Mussi, sum kettan eitur, frá eini konu í Danmark, greiðir Mette Nygaard frá.

– Eg hevði leingi ynskt mær eina kettu, men tað skuldi ikki bara vera ein og hvør. Eg setti lýsing í bløðini um at fáa eina persarakettu, men ongin svaraði. Síðani royndi eg at leita inni á internetinum í Den Blå Avis, og har fann eg so eina. Eg ringdi til konuna beinanvegin, og hon segði, at hon hevði ikki meira enn sløkt telduna og sett lýsingina í.

Mussi noyddist ígjøgnum eina rúgvu av vaccinatiónum og ymiskum øðrum, áðrenn hon kom til Føroya. Hetta heldur Mette vera ógvuliga tvørligt, og kom hetta at kosta teimum heilar 2000 krónur eyka, so tilsamans kostaði persarakettan teimum 2500 krónur. Í Danmark kosta ektaðar persarakettur millum 2000 og 3000 krónur, men av tí, at Mussi var "brúkt", so fingu tey hana fyri bert 500 krónur.

### Kettlingar við

– Tá eg tosaði við konuna, sum seldi kettuna, fortaldi hon mær, at kettan allarhelst skuldi leggja innan ikki so heilt leingi, sigur Mette. – Og fyri umleið seks vikum síðani legði hon so seks persarakettlingar. Men tveir av teimum eru deyðir, so nú eru bara fýra eftir.

Familjan Nygaard ætlar sær sjálv at hava ein av kettlingunum. Ein svartur frensur, sum er rættiliga sjáldsamur. Annars er ætlanin at selja hinar kettlingarnar.

– Eg tosaði við konuna um, hvat persarakettlingar kosta í Danmark. Hon fortaldi mær, at teir eru rættiliga dýrir. Serliga tær trílittu honirnar, tí tær hava møguleika at leggja kettlingar í øllum litum. So okkara kettlingar koma helst at kosta millum 1500 og 2000 krónur. Ein í Hvannasundi hevur frætt, at vit hava fingið persarakettlingar, so nú eru bara tveir eftir.

Tað er eisini møguligt at fáa ættartalvu til kettlingarnar. Mussi hevur sjálv ættartalvu, men hetta kostar rættiliga nógv. Mette og Kenneth ætla at byrja at ala persarakettur, um tað vísir seg, at áhugi er fyri tí.

– Mussi hevði longu lagt tvær ferðir, áðrenn vit fingu hana, og nú er hon longu slitin. At leggja hesuferð tók hart uppá hana. Hon missir javnvágina. Vit hava verið hjá djóralækna, men eg haldi, at tað tykist sum um djóralæknin ikki hevur so stóran áhuga í húsdjórum. Og tað haldi eg, vit mangla her í Føroyum. Ein djóralækna, sum bara tekur sær av húsdjórum.

Men kettlingarnir eru ógvuliga fittir. Teir eru góðir í sær. Teir eru sjáldsamir, og ógvuliga familjuvinarligir. Børnini hjá Mette og Kenneth bera teir og spæla við teir, og tað leggja teir onki petti í. Persaraketta erannars eitt kettuslag, sum heldur seg nógv inni, og hon hevur stóran tørv á at vera saman við menniskjum. Eisini skulu persarakettur passast meira í mun til aðrar kettur. Tær skulu helst greiðast og klippast. Eisini skulu tær vaskast, men sigur Mette, at Mussi dámar ógvuliga væl at sleppa í bað. Men hevur tú børn, so er persaraketta eitt upplagt kettuslag at fáa sær.